

# Starv sum bókhaldari á Havstovuni

**Hevur tú útbúgving innan skrivstovuyrkið ella líknandi, ert ágrýtin og áhugað/-ur í einum hálvtíðarstarvi, so er eitt fjølbroytt og áhugavert starv sum bókhaldari leyst at søkja á Havstovuni.**

Starvsstaðið er í móttøkuni á Havstovuni sum partur av umsitingini. Byrjast skal skjótast gjørligt.

Vit bjóða eitt fjøllbroytt starv við nógvum skiftandi uppgávum og samskifti bæði innanhýsis og úteftir.

Havstovan er ein stovnur undir Fiskimálaráðnum og varðar av Havrannsóknarskipinum Jákup Svera, Hvalagransking og Fuglakanningarstøðini.

## Arbeiðsøkið

Arbeiðið sum bókhaldari er rættiliga fjølbroytt, har tú fert at:

- Føra bókhald
- Røkja skrivstovuna og móttøkuna
- Gera annað fyrifallandi arbeiði
- Í stóran mun at arbeiða í toymi við umsitingini á Havstovuni

## Setanartreytir

Hesar eru:

- Skrivstovuútbúgving ella aðra viðkomandi útbúgving
- Royndir við fyrisiting
- Kunnleiki um kt-skipanir, so sum Búskaparskipan Landsins, o.l.
- Góður málførleiki
- Góður telduførleiki á brúkarastigi
- Góð samstarvsevni og góður førleiki at arbeiða sjálvstøðugt

Løn sambært sáttmála millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið. Starvið er flokkað í 5. flokki.

## Umsókn

Umsókn við avritum at prógvum, CV og viðkomandi skjølum skal vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 15. desember 2025. Umsókn skal sendast í telduposti til Havstovuna frámerkt ”Starv” á **starv@hav.fo**.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til: Erling í Liða, fíggjar- og umsitingarleiðara, teldupost **erlingl@hav.fo**, ella Maritu Rasmussen, stjóra, teldupost **marita@hav.fo**, tlf. 35 39 00.

**Um Havstovuna:** Á Havstovuni arbeiða vit við at granska, kenna og ráðgeva um fiskiskap og havumhvørvið í teimum økjum, har Føroyar hava fiskiveiðuáhugamál. Havstovan hevur sostatt nógva vitan um lívfrøðiliga ríkidømið, sum føroyski búskapurin stendur á. Havstovan ráðgevur almennu myndugleikunum um m.a. fiskiskap, luttekur í fiskiveiðusamráðingum, og í altjóða og vinnuligum verkætlanum. Á Havstovuni verður granskað í øllum teimum viðurskiftum, sum hava týdning fyri livilíkindini hjá sjófeinginum kring Føroyar.

Aftrat vanliga arbeiðinum arbeiðir Havstovan við fleiri verkætlanum. Summar av hesum ger stovnurin einsamallur, meðan aðrar verða framdar í samstarvi við føroyskar ella útlendskar granskingarstovnar og/ella vinnuna. Verkætlanirnar eru oftast fíggjaðar uttan fyri Havstovuna. Á Havstovuni arbeiða 34 starvsfólk og umborð á okkara havrannsóknarskipi Jákup Sverra arbeiða 16 sjófólk.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

Nóatún 1
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo